# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

**Føðingar**

Leygardagin 4. okt. fingu Frederieke og Høgni Jóanesarson eina dóttir. Hon vigaði 3285 g og var 48,5 cm long. Hon fekk navnið Aimée Veerle. Tey búgva í Gouvieux í Fraklandi (uttan fyri París).

15. oktober fingu Mary-Ann og Høgni Erling Bech, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3800 gr.

15. oktober fingu Jannet S. Haraldsen og Kjartan Olsen, Sandavágur, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3750 gr.

16. oktober fingu Eyð Skoubo og Birgir Svavarsson, Tórshavn, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3350 gr.

17. oktober fingu Súnbjørt Christiansen, Hoyvík og Jóhan Hentze, Skúvoy, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3850 gr.

18. oktober fingu Sigtór Asbjørn, Dávid, Oddur og Ari eina lítlasystir sum var 52 cm. long og vigaði 3620 gr. Foreldrini eru Eyðvør og Jógvan Arni Petersen, Sørvágur.

18. oktober fingu Tóra Trier Petersen og Tummas Yang Simonsen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3150 gr.

19. oktober fingu Maria Vang Justinussen og Niels Pauli Justinussen, Leirvík, eina dóttur. Hon var 56 cm. long og vigaði 4000 gr.

19. oktober fingu Gunnbjørg og Andras Andreasen, Sørvágur, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3600 gr.

20. oktober fingu Heidi og Jógvan Kristin Olsen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3650 gr.

22. oktober fingu Laila Waag Høgnesen og Trygvi Dalsgaard, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3890 gr.

**50 ár**

23. oktobur fylti Elinborg Hansen, búsitandi í Havn ættað úr Norðragøtu, 50 ár. Dagurin verður hildin í bygdarhúsinum í Leirvík fríggjadagin 31. okt kl. 19. Tekning til veitsluna á tlf. 44 10 68 ella 31 54 24 í seinasta lagi 25. okt. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**70 ára føðingardagur**

22.10.08 fylti Sigrid M. Dalsgaard, Hoyvík, 70 ár. Føðingardagurin verður hildin 25.10.08 kl. 19.00 í matarhøllini í Føroya Studentarskúla og HF-skeiði í Hoydølum. Øll eru vælkomin.

**80 ár**

Mánadagin 27. okt. verður Hertha Johannesen á Nesi 80 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 1. nov. frá 10 til 14 í missiónshúsinum á Toftum. Øll eru vælkomin.



Leygardagin 25. oktober 2008 kl. 15 giftast í Rituvíkar kirkju Sigrid Eva á Kinn av Strondum og Súni Forná Olsen úr Rituvík. Brúdleypið verður fyri innbodnum í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.

## Minningarorð um mína kæru ommu

# Sigga Maria Egholm Debes

**Fødd. 11/8-1920 deyð 21/10-2008**



Ja omma góða, nú upprann tann tíðin at tú slapp hiðani foldum frá inn í dýrdina, har ongin sorg, pína, neyð, og grátur er, tað má sigast, at tað er eitt stórt undur fyri meg at fáa at vita at nú er tú sloppin.

Í seinastuni, meðan tú livdi her niðri, hevði tú trongt teg í gjøgnum mangan mótgang av tínari sjúku og pínu, og eg var mangan bekymraður um teg, eg hugsaði mangan hvat fer nú at henda.

Gott nokk var tú ofta akut innløgd, men viðgerð fekst tú, tað eri sera takksamur fyri, men eitt hugsaði eg um, hvat var mest akut fyri tínari støðu, tað var at Harrin tók teg heim, og nú eru vit komin til tað røttu raðfesting og úrslit, at nú er tú sloppin heim í dýrdina.

Eg kann minnast nógv gott um teg um hvussu forholdini hingu saman okkara millum, ja sanniliga hevur tað verið alt bæði fyri meg okkum øll, tú var altíð líka umhugsin við okkum øll. Tað var mangar gangir, ta tíðina tá vit gingu í skúla, at vit komu heim til tín og fingu okkum døgurða, vit hildu altíð at tað var so spennandi, um hvat tað var vit fingu at eta frá tær, tí tað var altíð góður matur man fekk frá tær, og tú dugdi so væl at gera mat, tað skal tú eiga.

Ja góða omma, eg havi altíð følt meg vælkomnan inn til tín, tú hevur verið eitt opið, klárt og fyrikomandi hjarta fyri hvørja mannaætt, sum hevur stokkið inn á gólvi hjá tykkum.

Eg kann sjálvur minnast tað tíð eg búleikaðist á barnaheiminum, tá búði man niðri í býnum og rættari sagt tú og abbi eisini, tá møttist man oftani niðri í býnum. Tað helt eg vera rættiliga hugnaligt, vit prátaðu eina løtu, áðrenn tú fór at gera tíni ørindir, tá letur so fitt úr tær: Fær tú bara niðan til abba so fært tú ein góðan drekkamun frá honum, onkuntíð kom man bara sjálvur og vitjaði, men tað var ofta, tí man búði so tætt uppá, og man kom altíð líka væl út av tí, man sat og prátaði við teg og abba um mangt og hvat, so man kom ongantíð orðfátækur úr húsinum hjá tykkum aftur. Tað sum tit ikki vistu var ikki vert at vita. Eg eri í hvussu so er komin væl víðari ígjøgnum lívið eftir tykkum, tað skula tit eiga.

Men mín kæra omma, eg vil hjartaliga takka tær fyri tíðina tú hevur verið her niðri hjá okkum, og ynskja tar alt gott fram yvir nú tú ert farin higani foldum frá og inn í dýrdina, Harrin verið við tær, Guds friður verður yvir minninum um okkara kæru elskaðu ommu.

*Nå i denne stunden so nær,*
*Nå du åbne bør,*
*Hjerte stille ofte dør,*
*Men frelserens stemme du hør.*

**Heilsan ommusonur**
**Niels Heðin Gaard Joensen**

# Svingarar á pall á Tvøroyri

**Leygarkvøldið verður afturhvarv í TB húsinum, har sera væl umtókti sekstiárabólkurin, Beat Shots, fer at spæla gamlar slagarar**



*Her eru Beat Shots mannaðir við Birgar Niclasen, vinstrumegin, Erolf Olsen og Paula Einarssyni høgrumegin. Aftanfyri trummurnar situr hans Olaf Debes*

Í annaðkvøld – leygarkvøldið 25 oktober – verður forvitnisligur dansur í TB húsinum á Tvøroyri. Tað er Lionsklubburin í Suðuroy, sum skipar fyri tiltakinum, og tað verður ongin annar enn gamli og sera vælumtókti bólkurin, Beat Shots, sum fer at spæla. Í steðginum fer Tróndur Nólsøe at venda plátum.

Beat Shots var sera vælumtóktur bólkur, sum hevði sína stórtíð í sekstiárunum, men eisini spældi nakað eftir tað.

Teir, ið manna bólkin nú leygarkvøldið, verða Erolf Olsen, Birgar Niclasen, Pauli Einarsson og Finn Thomsen.

Dyrnar lata upp klokkan 23 og atgongumerkið kostar 100 krónur. Í dansinum á Tvøroyri fara teir at spæla gamlar slagarar, mest frá sekstiárunum og frá tíðliga í sjeytiárunum. Eitt nú Creedence Clearwater Revivel, Dave Clark Five, Elvis og annað.

Allur peningurin, sum kemur inn, fer óskerdur til vælgerðandi endamál í Suðuroynni.

**-áki-**

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!